LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 20. apríl 2016
J.Nr.: LUM-32- 15/00010-8
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

Frágreiðing

frá

eftirlitsvitjan í

Skúlanum á Trøðni

tann 29. januar 2015

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Innihaldsyvirlit

1. Inngangur 3

2. Skipan av eftirlitsvitjanini 4

3. Lýsing av Skúlanum á Trøðni 6

4. Samrøða við skúlastjóran 6
   4.1. Upptøka av næmingum 7
   4.2. Læriætlanir 7
   4.3. Starvsfólk 8
   4.4. Samstarv við fjølbrekatoymið Smæruna og umlættingarstovnarnar 8

5. Rundtúrur í skúlanum 9
   5.1. Undirvísing av næmingunum 9
   5.2. Sjúkrarøkt av næmingunum 11

6. Endalig samrøða við skúlastjóran 11

7. Samandráttur 13

8. Tilmæli 15

1. Inngangur

Tann 1. oktober 2014 varð heimildin hjá Løgtingsins umboðsmanni víðkað til eisini at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum o.ø., sum hava til uppgávu at taka sær av børnum og ungum. Umboðsmaðurin skal m.a. hava eftirlit við, at Føroyar halda ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum (ST) um at tryggja rættindi hjá børnum og ungum.

Í hesum sambandi gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eftirlitsvitjanir á stovnum fyri børn og ung sum hava menningartarn og/ella bera fjølbrek. Orsøkin til hetta var, at børnini á hesum stovnum teljast millum tey veikastu í samfelagnum og hava lítlan og ongan møguleika at siga frá sjálvi, um rættindi teirra ikki verða vird.

Umboðsmaðurin gjørdi í fyrsta umfari av at fara á eftirlitsvitjanir í Frítíðartilboðnum við Landavegin í Tórshavn og í fjølbrekatoyminum Smæruni í Tórshavn. Seinni gjørdi umboðsmaðurin av at víðka eftirlitsvitjanirnar til eisini at fevna um Skúlan á Trøðni og umlættingarstovnarnar Eirargarð 16 A í Tórshavn og Reiðrið (nú Mýrusóljan) í Runavík. Á henda hátt var gjørligt at fylgja fleiri av børnunum í fjølbrekatoyminum Smæruni gjøgnum allan gerandisdagin og harvið fáa eina heildarmynd av gerandisdegnum hjá teimum og síggja tey tilboð, sum verða bjóðað teimum. Eftirlitsvitjanin í Skúlanum á Trøðni fevndi sostatt bara um teir fimm næmingarnar, sum bóru fjølbrek.

Heimildirnar fyri slíkum eftirlitsvitjanum eru at finna í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 20. desember 2013 (Umboðsmanslógin) og eru soljóðandi:

> "...
>
> **§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
>
> ...
>
> **§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.
>
> **§ 6**.
>
> ...
>
> *Stk. 7*. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

§ 8. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

...

3. stk. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

..."

2. Skipan av eftirlitsvitjanini

Á eftirlitsvitjanini í Skúlanum á Trøðni luttóku vegna Løgtingsins umboðsmann Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður og Elinborg Apol, løgfrøðiligur fulltrúi.

Áðrenn eftirlitsvitjanina varð Mentamálaráðið kunnað um vitjanina, og umboðsmaðurin fekk útflýggjað læriætlanir og onnur skjøl fyri teir fimm næmingarnar við fjølbreki í Skúlanum á Trøðni.

Eftirlitsvitjanin vardi í 3½ tíma og byrjaði við einum fundi við skúlastjóran í Skúlanum á Trøðni, A. Aftaná fundin vísti B, lærari á skúlanum, umboðsmanninum runt í skúlanum.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina varð Skúlin á Trøðni kunnaður um, at umboðsmaðurin ynskti at hava samrøður við lærararnar, sum undirvístu teimum fimm næmingunum við fjølbreki.

Eftirlitsvitjanin endaði við einum fundi við skúlastjóran, A.

Aftaná eftirlitsvitjanina bað umboðsmaðurin Sernám um sernámsfrøðiligar frágreiðingar viðvíkjandi teimum fimm næmingunum. Sernám boðaði umboðsmanninum frá, at Sernám ikki hevði gjørt sernámsfrøðiligar frágreiðingar um hesar næmingar.

Við skrivi, dagfest 15. september 2015, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at greiða frá, um Mentamálaráðið hevur ætlanir um at útvega sernámsfrøðiligar frágreiðingar um næmingarnar við fjølbreki í Skúlanum á Trøðni.

Við skrivi dagfest 4. oktober 2015, kunnaði Mentamálaráðið umboðsmannin um, at Mentamálaráðið hevði biðið Sernám um viðmerkingar til spurningin. Sernám svaraði, at kanningar og frágreiðingar um allar næmingar í Skúlanum á Trøðni, sum vóru gjørdar innan upptøkuna, sbrt. § 4, stk. 2 í Serskúlalógini (løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla), vóru til skjals. Harafturímóti vóru ongar dagførdar og endurskoðaðar kanningar og frágreiðingar til skjals hjá Sernám.

Sbrt. § 4, stk. 4 í serskúlalógini ger landsstýrismaðurin nærri reglur um kanningina og frágreiðingina. Mentamálaráðið upplýsti, at hesar reglur fóru at verða gjørdar í næstum.

Mentamálaráðið upplýsti, at sbrt. § 5 í serskúlalógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um læriætlan, og at stig nú verða tikin til, at reglur um læriætlan verða gjørdar, har ásett eigur at vera, at sernámsfrøðiligar frágreiðingar og kanningar, m.a. frá Sernám, skulu vera partur av grundarlagnum undir læriætlanum.

Grundað á svarið frá Mentamálaráðnum um, at Sernám hevði kanningar og frágreiðingar um allar næmingarnar í Skúlanum á Trøðni, sum eru gjørdar innan upptøkuna, bað umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 29. oktober 2015, Sernám um at senda umboðsmanninum hesi skjølini fyri teir fimm næmingarnar við fjølbreki, sum eftirlitskanningin fevndi um.

Í skrivi, dagfest 3. november 2015 sendi Sernám umboðsmanninum umbidnu skjølini og kunnaði um, at í viðkomandi málum vóru fleiri ymiskar frágreiðingar, sum vóru gjørdar áðrenn skúlabyrjan hjá viðkomandi næmingum. Allir næmingarnir høvdu eitt viðføtt brek, sum viðførdi, at teir vórðu tilmeldaðir sernámsfrøðiligu skipanini frá føðing av, fyrr til Sernámsdepilin/Skúlan á Trøðni og aftaná 2006 til Sernám. Av tí at talan var um børn og ung við so stórum tarni, vóru sernámsfrøðiligu frágreiðingarnar grundaðar á eygleiðingar, neurologiskar- og aðrar læknaligar frágreiðingar, ergo- og fysioterapeutiskar frágreiðingar saman við námsfrøðiligum frágreiðingum umframt frágreiðingar um samskifti.

Sernám upplýsti, at frágreiðingar frá Sernám skulu innihalda ítøkilig tilmæli um, hvussu innihaldið í skúladegnum kann skipast við atliti at virkisførleikanum hjá einstaka barninum.

Áðrenn eftirlitsfrágreiðingin hjá umboðsmanninum varð endaliga greidd úr hondum, varð hon send Mentamálaráðnum og Skúlanum á Trøðni til viðmerkingar. Mentamálaráðið hevði ongar viðmerkingar til frágreiðingina. Skúlin á Trøðni sendi umboðsmanninum nakrar viðmerkingar við skrivi, dagfest 23. november 2015. Komið verður aftur til hesar viðmerkingar seinni í hesi frágreiðing.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin millum annað tikið útgangsstøði í niðanfyrinevndu reglum:

Lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. mars 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 22. mai 2015.

Kunngerð nr. 6 frá 16. januar 1992 um ST-samtykt frá 20. november 1989 um rættindi barnsins – Barnarættindasáttmálin.

Sáttmáli Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla.

3. Lýsing av Skúlanum á Trøðni

Skúlin á Trøðni, á Frælsinum 32, Tórshavn, er serskúli fyri børn við serligum tørvi og skal undirvísa næmingum, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum. Í skúlanum ganga umleið 50 næmingar í aldrinum 7-18 ár. Flokkarnir eru 12-13 í tali við 3-5 næmingum í hvørjum flokki.

Skúlabygningurin stóð liðugur í 1976, og var tá sjálvsognarstovnur. Í 1990 bleiv skúlin ein almennur skúli innan føroyska fólkaskúlan, og visitatiónsnevndin varð tikin av. Í 1998 varð Skúlin á Trøðni avtikin sum egin skúli og lagdur undir Sernámsfrøðiligu Ráðgevingina, ið fekk navnið Sernámsdepilin. Í mai 2005 varð nýggj løgtingslóg um serskúla viðtikin, og Skúlin á Trøðni gjørdist aftur sjálvstøðugur skúli við stjóra, stýri og upptøkunevnd.

Skúlin lýsir seg soleiðis:

> "Frálæran í skúlanum tekur støði í tí einstaka barninum. Á skúlanum leggja vit stóran dent á tryggleika, at næmingarnir kenna seg væl, og at teir hava tað gott, tá teir koma í skúla. Øll skulu fara væl við hvørjum øðrum.
>
> Vit virða tann einstaka næmingin. Næmingarnir uppliva at vera partur av einum felagsskapi, ið byggir á álit, trivna og tolsemi.
>
> Vit leggja dent á, at vit á skúlanum hava eitt umhvørvi, ið skapar glaðar og harmoniskar næmingar.
>
> Á Skúlanum á Trøðni leggja vit dent á sterku síðurnar hjá næmingunum. Grundarlagið undir frálæruni eru fortreytirnar og tørvurin hjá einstaka næminginum.
>
> Innihaldið í undirvísingini hjá einstaka næminginum verður ásett í eini skrivligari næmingalagaðari læriætlan, ið tekur støði í fortreytum næmingsins. Læriætlanin skal gerast í samstarvi millum foreldur ella verja og lærara næmingsins og verður eftirmett saman við teimum tvær ferðir um árið.
>
> Málið hjá Skúlanum á Trøðni er at menna einstaka næmingin persónliga, sosialt og fakliga. Málið er at gera næmingarnar so sjálvstøðugar og sjálvbjargnar sum gjørligt og betra teirra samskifti við onnur, soleiðis at teir kunnu virka í samfelagnum bæði í skúlanum og uttan fyri skúlagátt."

4. Samrøða við skúlastjóran

Eftirlitsvitjanin byrjaði við einari samrøðu við skúlastjóran, A.

Umboðsmaðurin kunnaði um heimildina í umboðsmanslógini, sum gevur umboðsmanninum heimild at kanna alla fyrisiting heimastýrisins og greiddi frá, at hendan eftirlitskanningin var ein beinleiðis avleiðing av, at umboðsmaðurin tann 1. oktober 2014 eisini var vorðin Barnanna umboðsmaður.

Eftirlitsvitjanin í Skúlanum á Trøðni var eitt framhald av eftirlitsvitjanini í fjølbrekatoyminum Smæruni í november 2014, og fevndi tí bara um teir fimm næmingarnar í Skúlanum á Trøðni, sum vóru í fjølbrekatoyminum Smæruni aftaná skúlatíð.

4.1. Upptøka av næmingum

Upptøka av næmingum fer fram sum ásett í Serskúlalógini. Skúlastjórin helt, at samstarvið millum Skúlan á Trøðni og Sernám var gott. Tó metti hann, at ásetingin í § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg um serskúla, var óheppin. Her verður ásett, at stjórin í Sernámsdeplinum skal vera formaður í upptøkunevndini. Skúlastjórin vísti á, at vandi kann verða fyri einum áhugamálsstríði, tí avgerðin um, hvønn skúla næmingurin skal vísast til, hevur fíggjarligan týdning fyri Sernám.

Við skrivi, dagfest 15. september 2015, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at greiða frá, um Mentamálaráðið hevur ætlanir um at broyta ásetingina í § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg um serskúla.

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2015, kunnaði Mentamálaráðið umboðsmannin um, at Mentamálaráðið hevur ætlanir um at broyta ásetingina í § 10, stk. 1, so at umboðið fyri landsstýrismannin er formaður í upptøkunevndini.

4.2. Læriætlanir

Skúlastjórin ynskti at gera læriætlanir, sum góvu eina realistiska mynd av næmingunum. Tað var torført at skriva læriætlanir fyri teir fimm næmingarnar, tí tað var so lítil framgongd hjá teimum. Skúlin á Trøðni hevði biðið um at fáa broytt § 5, stk. 3 í løgtingslóg um serskúla, sum ásetur, at læriætlanir skulu gerast í samstarvi við foreldrini. Í staðin ynskti skúlin, at skúlin gjørdi læriætlanirnar, sum so vórðu lagdar fyri foreldrini á foreldrafundi, tí hetta var betri í tráð við ta mannagongd, sum veruliga var.

Við skrivi, dagfest 15. september 2015, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at greiða frá, um Mentamálaráðið hevur ætlanir um at broyta ásetingina í § 5, stk. 3 í løgtingslóg um serskúla.

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2015, kunnaði Mentamálaráðið umboðsmannin um, at Mentamálaráðið ikki hevur ítøkiligar ætlanir um at broyta § 5, stk. 3. Mentamálaráðið vísti á, at læriætlan eigur at vera gjørd í samstarvi við foreldur og verja. Um orðið er í *samstarv* ella í *samráð* hevur ikki avgerandi týdning.

4.3. Starvsfólk

Tey starvsfólk, sum vóru um teir fimm næmingarnar við fjølbreki og undirvístu teimum, vóru námsfrøðingar, eitt hjálparfólk og ein fysioterapeutur. Stórt trýst lá á starvsfólkunum, tí heilsustøðan hjá næmingunum var so vánalig, at teir kundu fara millum hendurnar á teimum.

Umboðsmaðurin vísti á, at fólk við serligari útbúgving áttu at undirvíst hesum næmingum, sum í stóran mun samskifta við eygunum. Skúlastjórin var samdur í, at tað hevði verið ein fyrimunur, um starvsfólkini høvdu ein slíkan førleika, men greiddi frá, at hann hevði ein sera trongan fíggjarkarm.

Hann legði fíggjarætlan fyri eitt ár í senn og mátti leggja upp fyri at gjalda løn til starvsfólk, sum t.d. vóru sjúkrameldað.

Við skrivi, dagfest 15. september 2015, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at greiða frá, um Mentamálaráðið hevur ætlanir um, at tey starvsfólk, sum eru um næmingarnar við fjølbreki í Skúlanum á Trøðni, fáa skeið í tekn til talu og øðrum orðaleysum samskifti. Umboðsmaðurin bað eisini Mentamálaráðið um at greiða frá, um hædd verður tikin fyri skeiðsútreiðslum og útreiðslum til sjúkrafráveru til starvsfólkini í Skúlanum á Trøðni, tá fíggjarætlan verður løgd fyri skúlan.

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2015, kunnaði Mentamálaráðið umboðsmannin um, at tað er skúlastjórin, settur av landsstýrismanninum, sum setur hini starvsfólkini og hevur námsfrøðiligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virkseminum í skúlanum og tekur støðu til fakligu starvsfólkasamansetingina í skúlanum. Mentamálaráðið hevði tískil biðið skúlastjóran gjørt viðmerkingar til spurningin frá Løgtingsins umboðsmanni. Skúlastjórin svaraði, at starvsfólkini eru ógvuliga væl skikkað til arbeiðið, og hava tey øll verið á ymiskum viðkomandi skeiðum. Tó kundi skúlin og starvsfólkini ynskt, at fíggjarliga rásarúmið var størri, so lættari hevði verið at komið á skeið, vitjanir og ráðstevnur.

Mentamálaráðið upplýsti, at Mentamálaráðið fer saman við skúlastjóranum at kanna, um og hvussu fíggjarligt rásarúm til førleikamenning o.a. útreiðslur av starvsfólki kann verða nøktandi.

4.4. Samstarv við fjølbrekatoymið Smæruna og umlættingarstovnarnar

Undir eftirlitsvitjanunum í fjølbrekatoyminum Smæruni, tann 27. november 2014, og í umlættingarstovnunum Eirargarði 16 A og Mýrusóljuni, ávikavist tann 12. mars 2015 og tann 18. mars 2015, kom fram, at einki skipað samskifti er millum Skúlan á Trøðni, Smæruna og umlættingarstovnarnar hjá børnunum. Undir eftirlitsvitjanunum vóru ynski sett fram um, at skúlin, Smæran og umlættingarstovnarnir kunna hvønn annan um týdningarmiklar upplýsingar og vitan um tørvin hjá hesum børnum, sum bera fjølbrek.

5. Rundtúrur í skúlanum

Rundtúrurin í skúlanum byrjaði inni á kaffistovuni, har umboðsmaðurin fekk eitt prát við B, lærara í skúlanum. Hann greiddi frá, at umleið 35 fólk starvaðust í skúlanum, harav 14 lærarar, 8 námsfrøðingar, 3 stuðlar, 1 fysioterapeut og 1 heilsufrøðingur.

Skúlabygningurin var bygdur í lonum, soleiðis at næmingar, ið hóska saman, kundu vera saman í bólki. Mitt í skúlanum var ein høll, har næmingarnir kundu savnast og stór tiltøk haldast. Fleiri skúlastovur vóru til skapandi fak, so sum tónleikastova, handarbeiðsstova og høli til træsmíð. Skúlin hevði eisini rørsluhøll og svimjihyl/venjingarhyl við heitum vatni. Høli vóru til fysioterapeut og heilsusystir. Heilsusystir var í skúlanum hvønn týsdag.

Teir fimm næmingarnir við fjølbreki høvdu síni egnu høli í einum nýggjum parti av skúlanum. Hesi høli vóru umleið 5 ára gomul. Hølini hóskaðu væl til hesar næmingarnar, tí tey kravdu nógv pláss til hjálpitól. Talan var um eitt stórt meginrúm við fleiri smærri rúmum útfrá. Nógv tíð fór til røkt av næmingunum, og teir høvdu lítla orku. Fleiri av teimum skuldu t.d. standa í standistativi, skiftast, matast o.s.fr., meðan teir vóru í skúla.

5.1. Undirvísing av næmingunum

Á rundtúrinum hitti umboðsmaðurin tveir av næmingunum við fjølbreki í hølinum til træsmíð. Næmingarnir tókust við at "smíða tjaldur" saman við tveimum starvsfólkum. Hetta gekk fyri seg á tann hátt, at eitt tjaldur var teknað upp á eitt træsprek. Næmingarnir smíðaðu so, við førdari hond, smáar seymir niður í teknaðu linjurnar.

Í hølunum hjá næmingunum við fjølbreki tosaði umboðsmaðurin við eitt av starvsfólkunum. Bara ein næmingur var til staðar. Tveir av næmingunum vóru burtur frá skúla vegna sjúku. Á vegginum hingu uppsløg um, hvussu næmingarnir skuldu røktast. Umboðsmaðurin fekk avrit av hesum uppsløgum.

Tey, sum starvaðust við næmingunum, sum bóru fjølbrek, vóru antin námsfrøðingar ella hjálparfólk, t.v.s. at eingin var útbúgvin lærari. Víst varð á, at í tí vanliga fólkaskúlanum hava næmingar, sum hava onkran serligan tørv, stuðul umframt at fáa vanliga undirvísing frá lærara. Í Skúlanum á Trøðni skulu starvsfólkini, sum eru um næmingarnar við fjølbreki, bæði vera undirvísarar og stuðlar.

Undir eftirlitsvitjanini í fjølbrekatoyminum Smæruni, tann 27. november 2014, greiddu foreldrini samljóðandi frá, at tey ikki hildu, at børn teirra fingu skikkaða undirvísing í Skúlanum á Trøðni. Foreldrini vóru ónøgd og saknaðu áhuga frá Skúlanum á Trøðni at læra næmingarnar við fjølbreki nakað fakligt. Foreldrini vístu á, at børn, sum bera brek, eisini hava rætt til undirvísing sum onnur børn. Fleiri av foreldrunum royndu sjálvi at undirvísa børnunum heima og læra tey bókstavar og tøl. Onkur næmingur hevði fingið eina teldu til samskifti, men eingin dugdi at fáa telduna at virka.

Foreldrini vístu eisini á, at samskiftið millum Skúlan á Trøðni og fjølbrekatoymið Smæruna er ov vánaligt. Einki samstarv er millum skúlan og Smæruna, og harvið fer týdningarmikil kunning um heilsustøðu og stimbran av børnunum fyri skeyti.

Við skrivi, dagfest 15. september 2015, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at greiða frá, hvørja ætlan Mentamálaráðið hevur um at betra undirvísingina av næmingunum við fjølbreki í Skúlanum á Trøðni.

Við skrivi til umboðsmannin, dagfest 4. oktober 2015, vísti Mentamálaráðið á, at sernámsfrøðiligar kanningar og frágreiðingar eru til taks áðrenn upptøku av næmingi, og at læriætlan verður gjørd og dagført og eftirmett tvær ferðir um árið. Mentamálaráðið fer at taka stig til at áseta nærri reglur um hesar, sum ein liður í m.a. at fáa sernámsfrøðiligar kanningar og frágreiðingar og læriætlanir at verða knýttar enn tættari at hvørji aðrari, við m.a. tí fyri eyga at gera undirvísingina so góða sum til ber.

Mentamálaráðið hevði biðið Skúlan á Trøðni um viðmerkingar til spurningin frá umboðsmanninum. Skúlastjórin helt, at næmingarnir við fjølbreki í Skúlanum á Trøðni fáa eina sera góða undirvísing í skúlanum. Vælskikkað starvsfólk undirvísa teimum. Har eru starvsfólk, ið hava millum 10 og 20 ára royndir at arbeiða við næmingum við fjølbreki, og eru hesir undirvísarar framúr køn til júst slíka undirvísing. Fysioterapeutur er knýttur at stovuni, eins og fysisku karmarnir eru sera góðir, við m.ø. serligum venjingarhyli.

Við skrivi, dagfest 23. november 2015, sendi Skúlin á Trøðni umboðsmanninum hesa viðmerking:

> " ...
>
> ... sjálvsagt er tað sera álvarsligt, tá foreldrini eru ónøgd við undirvísingina.
>
> Í virðisgrundarlagnum fyri skúlan, verður m.a. sagt, at frálæran tekur støði í einstaka barninum, at vit virða næmingin, og at vit leggja dent á sterku síðurnar hjá næminginum, eins og at vit vilja menna næmingin sosialt og fakliga. Fyribilsfrágreiðingin fortelur okkum, at hesi foreldur ikki meta, at skúlin livir upp til virðisgrundarlagið.
>
> Sjálvandi taka vit slík úttalilsir í størsta álvara, og vilja vit tosa við foreldrini um teirra ónøgd. Starvsfólkini standa rættiliga spyrjandi, tí samstarvið við foreldrini er tætt og gott, og hava foreldrini ikki givið teimum somu fatan, sum frágreiðingin sigur.
>
> Talan er um sera veikar næmingar, og ofta meta starvsfólkini, at tey ikki kunna geva næmingunum tað, ið foreldrini ynskja og vóna. Soleiðis er eisini við teldutøknini. Hon er til tíðir sera góð og gevandi, men sum við øllum undirvísingartilfari, so má næmingurin vera førur fyri at skilja og arbeiða við hesum.
>
> ...
>
> Tað er týdningarmikið, at hesir næmingar læra at lesa og skriva, og royna vit sjálvsagt at fáa teir til tað, men tíverri eru slík krøv aloftast ov høgt sett.
>
> Tað hevði verið sera gott, um hesir veiku næmingar kundu verið greinaðir av fakfólki, so starvsfólk kundu arbeitt út frá hesum. Eisini vildi slíkar nágreiniligar kanningar kunna hjálpt til, at foreldur og starvsfólk betur skiltu hvønn annan og betur kundu drigið somu línu."

5.2. Sjúkrarøkt av næmingunum

Summir av næmingunum vóru ógvuliga illa fyri heilsuliga. Starvsfólkini hildu ikki, at tað var teirra uppgáva sum námsfrøðingar og hjálparfólk at súgva næmingarnar fyri slím og geva teimum heilivág, meðan teir vóru í skúla. Starvsfólkini ivaðust í, um hetta yvirhøvur var loyvt. Spurningurin var, um ein sjúkrasystur ikki átti at tikið sær av hesum, ella um næmingarnir kanska áttu at fingið heimaundirvísing.

Við skrivi, dagfest 15. september 2015, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at greiða frá, hvørja ætlan Mentamálaráðið hevur um, hvør starvsbólkur skal gera sjúkrarøktararbeiði viðvíkjandi næmingunum, sum bera fjølbrek, so sum at geva teimum heilivág og súgva slím, meðan teir eru í skúla.

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2015, kunnaði Mentamálaráðið umboðsmannin um, at spurningurin ikki er so einfaldur at svara. Flestu av næmingunum við fjølbreki eru sera veikir heilsuliga, og støðurnar hjá hesum næmingum og starvsfólkunum, sum eru um teir, kunnu vera rættiliga viðkvæmar og serstakar.

Mentamálaráðið hevði biðið skúlastjóran um viðmerkingar, og hann helt, at starvsfólkini eru sera dugnalig og hava áralangar royndir við hesum næmingum, so torført er at síggja, hvør dugir betur enn tey at vera um hesar næmingar. Eisini helt skúlastjórin, at skúlin óivað átti, í samráð við skúlar og stovnar í somu støðu, at fingið niðurskrivaðar reglur um, nær næmingur eigur at vera heima, og nær hann er førur fyri at koma í skúla. Skúlastjórin mælti til, at nærri reglur vera gjørdar um, nær tað ikki er ráðiligt av heilsuávum, at næmingurin er í skúla.

Hesum tók Mentamálaráðið undir við og fór at taka stig til at kanna, um starvsbólkur í Skúlanum á Trøðni røkir sjúkrarøktararbeiði, sum tey ikki eiga.

6. Endalig samrøða við skúlastjóran

Eftirlitsvitjanin endaði við eini samrøðu við skúlastjóran, A, har tikið varð samanum.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um skúlin hevði arbeitt við eini heildarætlan fyri næmingarnar, sum bera fjølbrek, har lærarar koma til næmingarnar, í staðin fyri at hesir næmingar, sum eru so illa fyri heilsuliga, verða fluttir runt. Skúlastjórin segði, at eingin slík heildarætlan var gjørd, men at tey høvdu tosað um henda møguleikan í skúlanum. Skúlastjórin vísti á, at tað var sera torført at siga, á hvørjum støði næmingarnir vóru viðvíkjandi læringarevni.

Skúlastjórin vísti á, at fleiri av næmingunum vóru so illa fyri heilsuliga, at hann hevði biðið starvsfólkini um at skjalfesta alt, ið gjørt var, um so skuldi verið, at onkur av næmingunum fór í skúlatíðini. Hann hevði givið starvsfólkunum boð um, at tey ikki áttu at geva næmingunum heilivág.

Umboðsmaðurin staðfesti, at ringt er at skilja ímillum undirvísing og røkt av hesum næmingum.

Skúlastjórin segði seg vera nøgdan við teir fysisku karmarnir hjá skúlanum og tey starvsfólkini, hann hevði, men at skúlin var fíggjarliga sperdur. Hann helt, at skúlin átti at umsitið frítíðarskúlan. Um so var, høvdu námsfrøðingarnir í frítíðarskúlanum eisini verið ein partur av starvsfólkahópinum í skúlanum.

Umboðsmaðurin greiddi frá, hvørjar trupulleikar hon ætlaði sær at taka upp í sambandi við eftirlitsvitjanina:

- Skikkað undirvísing av næmingunum, sum bera fjølbrek. Tað er týdningarmikið at hesir næmingar læra t.d. at lesa eitt sindur, tí tað hevði bøtt munandi um lívsvirðið hjá teimum.

- Heildarætlan fyri næmingarnar, sum bera fjølbrek, soleiðis at lærarar koma til næmingarnar, í staðin fyri at næmingarnir verða fluttir aftur og fram.

- Dagførdar sernámsfrøðiligar frágreiðingar fyri hvønn einstakan av næmingunum, sum bera fjølbrek, soleiðis at ein klárari mynd kann fáast av, hvat næmingarnir kunnu væntast at megna at læra.

7. Samandráttur

Tann 29. januar 2015 var Løgtingsins umboðsmaður á eftirlitsvitjan í Skúlanum á Trøðni, á Frælsinum 32, Tórshavn. Skúlin er serskúli fyri børn við serligum tørvi, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum. Skúlin er stovnur undir Mentamálaráðnum. Eftirlitsvitjanin fevndi um teir fimm næmingar við fjølbreki, sum uttanfyri skúlatíð vóru í Fjølbrekatoyminum Smæruni. Á eftirlitsvitjanini luttóku umboðsmaðurin og eitt starvsfólk hjá umboðsmanninum.

Samanumtikið er umboðsmaðurin væl nøgd við eftirlitsvitjanina. Mentamálaráðið og Skúlin á Trøðni hava víst vilja at loysa teir trupulleikar, sum umboðsmaðurin vísti á, og sum framhald av vitjanini hjá umboðsmanninum fór Mentamálaráðið í holt við lógarbroytingar í Serskúlalógini.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina sóknaðist umboðsmaðurin eftir sernámsfrøðiligum frágreiðingum fyri næmingarnar við fjølbreki. Mentamálaráðið upplýsti, at kanningar og frágreiðingar um næmingarnar eru gjørdar í sambandi við upptøkuna til Skúlan á Trøðni, men at tær ikki eru dagførdar og endurskoðaðar. Farið verður tí undir at gera nærri reglur um hetta.

Við vandanum fyri fíggjarligum áhugamálsstríði í huga, ynskti umboðsmaðurin at vita, um ætlanin er at broyta ásetingina í § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg um serskúla (serskúlalógini). Mentamálaráðið upplýsti, at ætlanin er at broyta ásetingina, soleiðis at umboðið fyri landsstýrismannin verður formaður í upptøkunevndini**.**

Sambært § 5, stk. 3 í serskúlalógini skulu læriætlanir gerast í samstarvi við foreldrini, men mannagongdin er, at skúlin ger læriætlanirnar, sum síðani verða lagdar fyri foreldrini á foreldrafundi. Við veruligu mannagongdini í huga, ynskti umboðsmaðurin at vita, um ætlanin er at broyta ásetingina í § 5, stk. 3. Mentamálaráðið upplýsti, at ongar ítøkiligar ætlanir eru um at broyta ásetingina.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um ætlanin er, at starvsfólkini, sum eru um næmingarnar við fjølbreki, fáa skeið í tekn til talu og øðrum orðaleysum samskifti, og um hædd verður tikin fyri m.a. skeiðsútreiðslum í fíggjarætlanini fyri skúlan. Mentamálaráðið upplýsti, at sambært skúlastjóranum hava starvsfólkini verið á viðkomandi skeiðum. Mentamálaráðið fer saman við skúlastjóranum at kanna, um og hvussu fíggjarligt rásarúm til m.a. førleikamenning av starvsfólkunum kann verða nøktandi.

Undir eftirlitsvitjanini hjá umboðsmanninum í fjølbrekatoyminum Smæruni vístu foreldrini á, at børn teirra ikki fingu skikkaða fakliga undirvísing í Skúlanum á Trøðni. Umboðsmaðurin ynskti at vita, hvørja ætlan Mentamálaráðið hevur um at betra undirvísingina av næmingunum við fjølbreki í Skúlanum á Trøðni. Mentamálaráðið upplýsti, at nærri reglur verða ásettar fyri sernámsfrøðiligar kanningar og frágreiðingar, og hesar skulu knýtast tættari at læriætlanunum, soleiðis at undirvísingin

gerst so góð sum gjørligt. Skúlin á Trøðni ætlar at tosa við foreldrini um ónøgd teirra og ynskir, at næmingarnir verða greinaðir av fakfólki, so starvsfólkini kunnu arbeiða út frá hesum.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, hvør starvsbólkur skal gera sjúkrarøktararbeiði viðvíkjandi næmingunum, sum bera fjølbrek, meðan teir eru í skúla. Mentamálaráðið vísti til Skúlan á Trøðni, sum metti, at verandi starvsfólk duga væl at vera um hesar næmingar. Skúlin ynskti, at nærri reglur verða gjørdar um, nær tað, av heilsuávum, ikki er ráðiligt, at næmingar eru í skúla. Mentamálaráðið tók undir við hesum og fer at taka stig til at kanna, um starvsbólkur í Skúlanum á Trøðni røkir sjúkrarøktararbeiði, sum tey ikki eiga.

Mentamálaráðið hevur í mars 2016 kunnað umboðsmannin um, at lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um serskúla hevur verið til hoyringar og í næstum fer at verða lagt fyri Løgtingið.

Í lógaruppskotinum verður skotið upp, at Sernám endurskoðar sernámsfrøðiligu frágreiðingarnar um næmingarnar eina ferð um árið. Serskúlin ger læriætlan fyri næmingin og kann í hesum sambandi fáa ráðgeving frá Sernám. Læriætlanin verður gjørd í samráð við foreldur og skal eftirmetast minst tvær ferðir um árið. Foreldur skulu kunnast um eftirmetingina. Serskúlin skal undirvísa sambært fólkaskúlalógini í so stóran mun sum til ber, men skúlastjórin kann, saman við Sernám og í samráð við foreldrini, gera frávik frá hesum.

Skotið verður eisini upp, at landsstýrismaðurin velur eitt umboð, sum er formaður í upptøkunevndini.

8. Tilmæli

Umboðsmaðurin mælir til, at fakliga undirvísingin hjá næmingunum við fjølbreki verður tryggjað við, at serlærdir lærarar standa fyri fakliga partinum av undirvísingini.

Umboðsmaðurin mælir til, at Sernám verður tengt nærri at arbeiðinum hjá Skúlanum á Trøðni at gera læriætlanir, soleiðis at ítøkiligu tilmælini í dagførdum sernámsfrøðiligum frágreiðingunum og kanningunum hjá Sernám verða partur av grundarlagnum undir læriætlanunum. Mælt verður til, at Skúlin á Trøðni ráðførir seg við Sernám í sambandi við gerð av læriætlanum, og at læriætlanirnar eisini skulu innihalda ein ætlan og eitt mál fyri fakligu menningina hjá einstaka næminginum.

Umboðsmaðurin mælir til, at skipað samskifti verður millum Skúlan á Trøðni, fjølbrekatoymið Smæruna og umlættingarstovnarnar hjá børnunum, soleiðis at samstarvað verður um m.a. stimbran av børnunum, og soleiðis at tryggjað verður, at samskiftishættirnir eru teir somu í bæði skúla, frítíðartilboði, umlættingarstovnum og heima.

Aftaná at hava verið á eftirlitsvitjan í fjølbrekatoyminum Smæruni, Skúlanum á Trøðni og umlættingarstovnunum Eirargarði 16 A í Tórshavn og Mýrusóljuni í Runavík, mælir umboðsmaðurin til, at ein heildarætlan verður gjørd fyri hesi børn, sum eru so heilsuliga veik, soleiðis at sleppast kann undan, at tey verða flutt ov nógv runt. Ein slík loysn ber møguliga við sær, at lærarin kemur á staðið, har børnini eru, fyri at undirvísa.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður